# Tvøroyrar Býráð stevnt

**Umstrídda leiðarastarvið á frítíðarskúlanum á Tvøroyri endar nú í rættinum**

LEIÐARASTARV

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Nógv umstrídda málið um leiðaran á frítíðarskúlanum á Tvøroyri endar nú í rættinum, har endurgjald verður kravt til tann umsøkjaran, sum varð vrakaður*

Tvøroyrar býráð noyðist nú í rættin at verja sína støðu í nógv umstrídda málinum um leiðarastarvið á frítíðarskúlanum á Tvøroyri.

Tað er Pedagogfelagið sum nú hevur stevnt Tvøroyrar Býráð í málinum.

Tað er nakað síðani at avgerð varð tikin um at stevna Tvøroyrar Býráð, men nú er so stevningin send.

Tað, sum Pedagogfelagið krevur, er endurgjald til tann umsøkjaran, sum ikki fekk leiðarastarvið á frítíðarkúlanum.

– Í hesum førum hendi tað, at einasti umsøkjari, sum leyk formligu krøvini í starvslýsingini varð settur til viks og tað krevja vit endurgjald fyri, sigur Jarvin Feilberg Hansen, formaður í Pedagogfelagnum.

Kortini er ongin endurgjaldsupphædd nevnd í stevningini so tað verður nakað, sum rætturin verður at taka støðu til.

Málið um leiðaran á Frítíðarskúlanum á Tvøroyri var rættiliga umstrídd og tað endaði heilt hjá Løgtingsins umboðsmanni.

Tað byrjaði tá ið leiðarin á Frítíðarskúlanum summarið 2004 fór í farloyvi í eitt ár.

Í tí sambandi søkti býráðið eftir pedagogi til fyribilsleiðari. Ein pedagogur og ein lærari søktu og tað endaði við, at lærarin varð settur.

Hetta vildi Pedagogfelagið ikki góðtaka, tí eftir lógini skal leiðarin á frítíðarskúlanum verða pedagogur.

Felagið hótti eisini við at niðurleggja arbeiðið á frítíðarskúlanum.

Hinvegin tvíhelt býráðið um, at læraraútbúgvingin í hesum føri kundi javntstillast við pedagogin og at lærarin var betri egnaður til starvið.

AFTUR OG FRAM

Síðani ferðaðist málið aftur og fram ímillum býráðið á Tvøroyri, Pedagogfelagið, Almanna- og heilsumálaráðið og sakførarar hjá pørtunum.

Tað endaði við, at Tvøroyrar býráð noyddist at ógildað starvssetanina av læraranum sum leiðara fyri frítíðarskúlan og at lýsa starvið leyst av nýggjum.

Men til starvið varð sett av nýggjum, varð sami lærari settur sum fyribils leiðari.

Tað endaði so við, málið varð lagt fyri Løgtingsins umboðsmann.

Hann metti, at málsviðgerðin var so óforsvarlig, at hann kundi ikki annað enn geva kommununi eina sera álvarsliga átalu fyri handfaringina av hesum málinum.

Viðmerkingarnar og niðurstøðan frá umboðsmanninum verða lagdar við stevningini.

# Gunnleivur fær kapping

**Tað er nú greitt, at stríðsval verður um formanssessin í Starvsmannafelagnum**

FORMANSVAL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Hesuferð fær Gunnleivur Dalsgarð kapping um formanssessin í Starvsmannafelagnum*

Fyri fyrstu ferð í mong ár er tað nú greitt, at tað verður stríðsval um formanssessin í Starvsmannafelagnum.

Starvsmananfelagið hevur aðalfund 4. mars og freistin at stilla valevni upp til formansvalið var úti sunnudagin.

Og nú er greitt, at tað verða tvey valevni til formansvalið.

Gunnleivur Dalsgarð, sum er formaður, hevur bjóðað seg fram at taka eitt tørn afturat.

Men samstundis hevur Heini Joensen eisini stillað upp til formansvalið

Gunnleivur Dalsgarð hevur verið formaður í Starvsmannafelagnum síðani 1997, tá ið hann tók yvir eftir Jákup Danielsen, sum tók seg aftur.

Síðani hevur Gunnleivur verið afturvaldur og hetta verður fyrstu ferð, at hann fær mótvalevni.

Heini Joensen hevur arbeitt hjá Skógrøkt landsins, men tí starvinum fór hann úr 1. januar og fór ístaðin í tíðaravmarkað starv hjá Starvsmannafelagnum til 1. mars 2006.

Hann var annars næstformaður í Starvsmannafelagnum, men eftir lógum felagsins, kann starvsfólk hjá felagnum ikki samstundis verða nevndarlimur, og tí er hann nú farin frá sum næstformaður

Ístaðin fyri hann kom eykalimurin, Niels Petersen í nevndina. Samstundis tók Selma Ellingsgaard við sum næstformaður fram til aðalfundin.

Hini í nevndini í Starvsmannafelagnum eru John Kjær og Eimi Fossdalsá.

# Jarvin verður sitandi

**Tað er nú greitt, at Jarvin Feilberg Hansen verður sitandi sum formaður í Pedagogfelagnum í tvey ár afturat**

FORMANSVAL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Jarvin Feilberg Hansen verður framhaldandi formaður í Pedagogfelagnum, tí ongin annar boðar seg fram*

Ovasta leiðsan í Pedagogfelagnum verður óbroytt næstu tvey árini.

Tað er greitt, nú freistin at stilla valevni upp til formansvalevni á komandi aðalfundi var úti sunnukvøldið.

Pedagogfelagið hevur aðalfund á Hotel Føroyum 18. februar og nú freistin at stilla valevni upp til formansvalið, er úti, er bara eitt valevnið á listanum og tað er formaðurin, Jarvin Feilberg Hansen. Hann kemur sostatt at halda fram sum formaður.

Annars standa eisini tveir aðrir nevndarlimir fyri vali. Talan er um Maud Wang Hansen og Leila Petersen og tær stilla báðar uppaftur. Hini í nevndini eru Jógvan Philbrow og Røgvi Fossádal.

Valskeiðið í pedagogfelagnum er tvey ár.